

# Vit leita eftir góðum viðleikara

Fíggjarmálaráðið søkir eftir løgfrøðingi til Lønardeildina

Ert tú royndur løgfrøðingur og vilt spesialisera teg í arbeiðsrætti? Ella ert tú nýliga útbúgvin og ynskir tær eina góða barlast á yrkisleiðini? So hevur tú møguleikan á Lønardeildini í Fíggjarmálaráðnum.

Sum løgfrøðingur hjá okkum fært tú spennandi uppgávur og mennir tíni fakligu og menniskjaligu evni. Tú kemur tætt at politiska myndugleikanum, fært ein fjølbroyttan arbeiðsdag, sum tú lutvíst kanst skipa eftir egnum tykki, og tú fært eitt arbeiðspláss, sum hugsar um framtíð tína og gevur tær góðar møguleikar fyri skeiðum og eftir-útbúgving.

**FØRLEIKAR**
Tú dugir væl at orða teg, bæði munnliga og skrivliga, dugir at grundgeva fyri tínum hugsanum og at lurta eftir øðrum sjónarmiðum. Tær dámar at hava nógv um at vera, tú hevur eitt sjálvstøðugt arbeiðslag, og fyrimunur er at kenna til samráðingar, eitt nú úr fakfelagsarbeiði.

**ARBEIÐSØKIÐ**
Arbeiðsøkið fevnir rættiliga víða. Tú verður við til sáttmálasamráðingar, við til at harm-onisera almennu sáttmálarnar, og tú fert at fyrireika felags lønarskipan hjá landinum, gera starvsfólkahandbók og fremja felags avtalur við fakfeløg um t.d. førleikamen-ning og starvsfólkapolitikk. Vanlig málsviðgerð verður eisini, eins og tú fert at ráðgeva øðrum stjórnarráðum í starvsfólkamálum.

**SETANARTREYTIR**
Setanartreytir og løn eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og løgfrøðingafelag Føroya, (BLF). Setanarøkið er alt Fíggjarmálaráðið og stovnar undir tí, umframt Løgmansskrivstovan og hini stjórnarráðini.

*Freistin at søkja er 19. desember 2007. Starvið verður sett sum skjótast, men vit bíða fegin eftir rætta umsøkjaranum.*

*Vilt tú vita meira, ring til Snorra Fjallsbak, stjóra á Lønardeildini, tlf. 35 22 00. Sí eisini www.lnd.fo.*

*Umsóknir við prógvum, lívrensli og møguligum viðmælum skulu sendast til: Fíggjarmálaráðið, Lønardeildin, Postboks 2039, 165 Argir.*

FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF FINANCE

REPROZ

# Listaleypurin

Í sambandi við nýskapandi verkætlan at nýta yrkislist í undirvísingini sóknast vit eftir dygdar-góðum listaverkum, sum kunnu geva børnum og unglingum listaligar upplivingar í tónleiki, sjónleiki, dansi, myndlist og virtuellari list.

Norðurlandahúsið, Mentamálaráðið og kommununar samstarva um eina trý ára royndarverkætlan árini 2008-2010. Verkætlanin hevur fingið navnið Listaleypurin, og endamálið við henni er at geva fólkaskúla-næmingum kring landið høvi til at uppliva list á høgum stigi í ymiskum listagreinum.

Stuðul verður latin til tíggju verkætlanir um árið. Ein úrvalsnevnd, ið verður mannað við yrkiskønum, tekur støðu til umsóknirnar og kann játta kr. 10.000–40.000 í stuðli til hvørt listaverk. Tey, sum fáa stuðul, skulu í minsta lagi sýna fram listaverkini í fimm ymiskum skúlum.

Bæði einstaklingar og bólkar kunnu søkja um stuðul úr Listaleypinum. Verkætlanin skal vera á fakliga høgum stigi og kann t.d. vera ein fram-sýning ella ein framførsla. Umsóknin skal lýsa ítøkiligu verkætlanina, hvørjum aldursbólki, ið listaverkið er ætlað, og saman við umsókníni verður sent tilfar sum myndir, dvd, cd ella tekstur, sum úrvalsnevndin kann nýta í arbeiðinum at meta um innkomnu umsóknirnar.



## Umsóknarfreistin er 15. des. 2007

**Sendið umsóknir um stuðul til Norðurlandahúsið, postboks 1260, FO-110 Tórshavn, og stílið tær til Hedvig Westerlund-Kapnas, verkætlanarleiðara.**

**Meiri kunning um Listaleypin fæst við at seta seg í samband við Hedvig Westerlund-Kapnas á tlf. 210125 ella á hedvig@nlh.fo.**

Kommunusamskipan Føroya · FØROYA KOMMUNUFELAG · Mentamálaráðið · norden Norðurlandahúsið í Føroyum

REPROZ